Ólavsøka 23 á Háskúlanum

GOTT FUNDARFÓLK, KVINNUR OG MENN.

Tá ið eg bleiv biðin at halda hesa talu, fylgdi eingin uppskrift við, einki stílaevni, sum til dømis fiskivinna fyrr og nú...eg fekk fult frælsi at velja, hvat eg skuldi leggja dent á. Onkuntíð er tað bara lættari at fáa at vita, tú gert soleiðis og soleiðis. Men so kortini, eitt privilegium at sleppa at siga frá og greiða frá málum, sum eru á tínum radara.  Ein tala ein slíkan dag skal vera savnandi, ikki politisk, ella ikki partapolitisk. Helst eitt aktuelt evni, sum fólk hevur áhuga fyri. Øll fólk ? hopleyst...

Eg byrji við at sitera javnaldurin Kára P: Skygni, "allastaðni útlendingur inst í sjálvum tær", ein rámandi mynd av sálarófriði, ráðaloysi ... hvat er tað at vera útlendingur innast inni...tulki tað sum at vera uttanfyri, føla at mann kennir ikki umhvørvið, kenna seg uppifjaraðan ella sleptan upp á fjall. Nógv av okkum eru kanska útlendingar innast inni, men nógv í Føroyum eru eisini útlendingar uttaná.

Hagstova Føroya hevur pr. 1 jan talt øll í Føroyum, og í Føroyum eru uml. 3000, sum eru úr øðrum landi enn Føroyum. Filipsoyggjar, Pólland, Rumenia, Teiland, Ukraina og Serbia eru tey londini, sum eru best umboðað   í Føroyum. Menn úr Rumenia og Póllandi og  kvinnur úr Teilandi og Filipsoyggjum.

INKLUSJÓN

Vit eru kanska ikki tað mest inkluderandi samfelagið í verðini, men integratión *krevur* inklusjón. Tað krevur, at vit eru opin og vísa áhuga fyri øðrum enn okkum sjálvum. Nógvir ymiskir partar skula arbeiða í hesum máli, integratiónslógin ger tað ikki ikki einsamøll.  Nú hugsi eg um Kringvarp Føroya.

Í útvarpi og sjónvarpi hoyra vit føroysk tíðini, og ein  partur er danskt: donsk viðtøl, serfrøðingar- ofta fólk, sum granskar føroysk viðurskifti í petridiskinum Føroyum, danskir venjarar, sum verða spurdir um ítrótt, ella tíðindamaðurin hjá Kristelig dagblad í Ísrael ...Kringvarpið eigur at vera størri partur av integratiónsarbeiðinum, inklusiónsarbeiðinum. Hugsa tær at vera í Póllandi og lurta eftir pólskum tíðindum....

Vit føroyingar skuldu, um nakar, duga at skilt hetta at vera í tvíningum. Útisetar hava í øldir yrkt um tað at búgva einastaðni og vera aðrastaðni, vit eru jú fødd sum tvískinningar og liva okkara lív soleiðis. Inklusión er at

loyva inn, taka uppí, lova upp í part. Ikki við tí treyt, at um tú verður sum vit sleppur tú uppí...

Kringvarpið skuldi sæð hetta sum eina avbjóðing, tey kundu hjálpt til við sendingum til henda bólk av borgarum, sendingar til útlendingar við útlendingum. Ikki bara eina sending har vit útstillað útlendingarar, telja tey og teirra lond og "snakka" um prosent og vantandi arbeiðskraft. Skula kanska lata tey útlendsku sjálvi fáa orðið og spæla teirra yndistónleik, víst á teirra mentan. Tað hevði kanska verið pláss fyri einari sending millum aðrar, har eru longu:

Rót og rútma, Plátubarrin, Leitisstein, ragnarock, jambalaia, vit spæla tit skriva, upp á tá, rokk og ró, óhoyrt, skratsj, plátupanelið, áðrenn Elvis........vit kundu kanska hoyrt onkra sending av og á t.d. "tilflytarin henda mánaðin" ella "útlendingurin hesa vikuna"........"munurin millum føroyskt og tagalog" ella tónleikur úr Póllandi, og sjónvarpið kundi kanska fingið pláss fyri einari sending fyri sendingina, sum eitur "steðgur".

Tað er syrgiligt og gamaldags , at Kringvarpið letur sum um vit eru partur av Norðurjyllandi. Fleiri túsund fólk, sum búgva í Føroyum skilja ikki tíðindini (og aðrar sendingar, t.d. ), sum verða varpað út um landið. Ja, nú tosi eg um danskt mál í miðlunum. Landslæknin og Mette F. verða varpað óviðgjørd út í loftið.

Sum FSA (føroyskt sum annaðmál) lærari plagdi eg at biðja næmingarnar lurta eftir útvarpi og Degi og viku, tí tað er so sera góð venjing. Tey komu aftur í skúla og søgdu, at tey skilja ikki danskt. Tey hava stríðst við at læra seg føroyskt, nú ið tey hava búsett seg her, og so skilja tey ikki útvarp Føroya! Og serstakliga nú ið útvarpið er partur av tilbúgving Føroya. Sjálvandi má útvarpsverturin gera ein samandrátt av tí sagda á føroyskum. ..Tað er at gleðast um, at partur av heimasíðuni hjá KVF er á enskum.

Íslendska Kringvarpið hevur á heimasíðu sínari tveir málknøttar annar vísandi til tíðindi á enskum, hin á pólskum. Eina ferð í fornu tíð hevði útvarpið veðurtíðindi á enskum, tey vóru ætlað ferðafólki, so mikið meira umráðandi at samskifta við tey, sum hava valt at búgva her. Kringvarp Føroya skal vera okkara felagsnevnari, ein savnandi kraft.

Og nógv integratiónsarbeiði *er* í gongd, beint nú er stuttsøgukapping, sum er fyri øll, og søgan, sum verður latin inn, kann vera á ymsum málum. Tað er stórt framstig, at føroyskir útlendingar fáa orðið. Tess fleiri íð fáa orðið fyri seg, tess betri fyri demokratiið. Tað verður eitt ”demokratiskt problem”, um nógv fólk eru uttan fyri vanligar demokratiskar prosessir, tað verið seg bý- og bygdarráð, foreldraráð, foreldrafundir í ítrótti, skúla og barnagarði. Og tað er nú, vit skula gera arbeiðið, tað er nú fólkini eru her,nú ið børnini fara í skúla, og skjótt eru hesi børnini vaksin og hava børn sjálvi.

Eitt annað tiltak, sum peikar rættan veg, er tann árligi altjóða ítróttardagurin, har øll eru vælkomin. Kanska ein fín lopfjøl til tilflytarar, sum vilja gerast partur av ítróttarfelag í bygdini/býnum.

## Flaggdagar

Men *í dag* flagga vit, ólavsøka er ein stórur tjóðarveitsludagur (-ar), til at minnast hendingar í 1030 á Stiklastøðum í Noreg. Tey eru farin at fyrireika 1000 árahald í Noreg 2030 verkætlanin eitur: **Kraften i Nasjonaljubileet og den store samtalen om Norge.** Vit hátíðarhalda eisini Ólav heilaga í Føroyum**,** henda stóra norska kongin, sum samlaði og kristnaði Noreg.

Vit hava nakrar fastar flaggdagar um árið. Teir kunna flokkast í 1.kirkjuligar flaggdagar, og í dag er ein av teimum, 2. Politiskar/tjóðarflaggdagar, og 3. føroyskar flaggdagar. *Í fyrsta* bólkinum eru sjálvandi kirkjuligar hátíðir sum jól og páskir...*í øðrum* bólki eru hátíðardagar hjá øðrum tjóðum. Í juni mánað veittrar flaggið ikki færri enn 5 ferðir fyri norðanlondum.

(DK 5, Svør. 6, Áland 9, Ísl. 17, Grønl. 21)

Í Danmark eitur dagurin grundlógardagur og er hátíðarhald av grundlóg og demokratii, svenskararnir kalla dagin flaggans dag, Áland sjálvstýrisdagur (1922), Ísland hátíðarheldur sjálvstýri (1944) og Grønland nevnir sín dag sjálvstýrisdag (2009). Í Føroyum hava vit ongan slíkan dag. Í hesum bólki eru eisini royalir føðingardagar.

*Triðji bólkur* er teir føroysku flaggdagarnir, tað er ein stuttur listi, vit hava grækarismessu (tjaldrið og várið) og sjálvandi flaggdagin 25 april, sum heiðrar merkið og allahalgannadag – minnisdagur teirra sjálátnu, og jóansøku...... Tað eru bara vit sum flagga 25. Apríl, hini Norðanlondini flagga ikki 25. Apríl, eins og vit

flagga teirra tjóðardagar. Í DK flagga tey við Merkinum  á ólavsøku, men tað er ein onnur søga.

Eitt flagg er eitt symbol, eitt savnandi tjóðarsymbol. Tað er so mikið týdningarmikið, at OL nevndin ivast í at lata russar og hvítarussar, sum hava verið útihýstir í altjóða kappingum síðani kríggið í Ukraina byrjaði, sleppa við men ikki við sínum egna flaggi, men einum sokallaðum neutralum flaggi. Also bara teir ikki hava tað russiska flaggið, so kunna teir koma....hvør skal siga, so eru teir ikki russarar. Tað verður sæð sum revsing, at sleppa ikki at nýta sítt flagg. Hvat er eitt neutralt flagg? Er Merkið eitt neutralt flagg? tá ið tað krevst danskt flagg á skótabúnan, um tú fert á jamboree í Korea, ella tá ið tú rørt single-scullara á olympiskum leikum? Eg veit..... tað svíður .....vit hata at skula viðganga tað....

Vit hava eisini havt flagggølur... sjálvandi . Í bókini hjá N J Arge um Merkið lesa vit um gøluna á Tingvøllum og Tinghúsvøllinum  í 1930...Í 2016 var eitt merkiligt neutralt flagg drigið á stong á Børsen og aðrastaðni í Danmark

Eg var eina ferð partur av einari flagggølu, tað var eina dansiferð. Stevnan varð hildin á einum flottum setri ella hotelli ella kongresssentri – hugsi í Finnlandi, og 5 fløgg veittraðu uttanfyri, nú ið stevnan skuldi setast. Jógvan Adolf Johannessen var formaður í Sláið ring. Vit  í dansihópinum tosaðu um hetta okkara millum og samdust um, at hetta var langt úti. Vit søgdu við Jógvan, at hann skuldi boða fyriskiparunum frá, at um Merkið ikki varð vundið á stong saman við hinum fløggunum, so fóru vit ikki upp á gólv. Hann var illa heitin, hann fekk at vita frá fyrskiparunum, at tað var ikki pláss fyri einum flaggi afturat. Vit blivu við okkara og at enda fekst ein loysn á hesum.

Kanska fleiri av okkum hava verið í onkrum vási, tá ið vit saknaðu merkið millum hini?

Men er tað  rætt, at privatfólk, ítróttarfólk og feløg skula standa við hesum trupulleika? Myndugleikarnir í Føroyum eiga at gera nógv meir til tess at vinna Merkinum rættindi, kanska vit hava brúk fyri eini fittari flagggølu, sum vit sjálvi definera.

## Okkara sjálvsfatan – okkara fatan av okkara samleika

Hvussu halda vit sjálv, vit eru, og hvussu vilja vit, at onnur skula uppfata okkum. Gloym alt um eindarmentan føroyinga,....hon hvarv við vekingarrørslum, slupptíð og ídnaðarkollvelting.

Men treyðugt so, okkurt var eftir: vit vóru kristin, hvít, tosaðu føroyskt, friðarfólk, og...í Føroyum var ikki stættamunur, ....nú broytist alt hetta, og broytingar sum tóku 100 ella 200 ár taka nú 10 ár...vit fáa snøgt sagt ikki fylgt við. Tað sum vit halda, vit eru, eru vit ikki. Tað er sárt at skula viðganga tað, sum at missa seg sjálva burtur eitt sindur.

Okkara uppfatan av okkum sjálvum sæst so væl í skaldskapinum, systrarnar hjá Eivør: *Lítla søta Elinborg við sóljugulum hári.../Elisabeth Maria við vøkrum bláum eygum...*

Og Bernhard Brim og Hans Andrias hava somu ljósleittu gentu í sínum sangum: *Tvey eygu siga so klár og blá.../Eitt silkiband um sítt gula hár ../Hon hevur gult og purlut hár og eygu klár og blá ....*Nú eri eg ikki farin í hernað ímóti hesum sangum, men brúki teir bara sum dømi um okkara yndismynd av gentuni. Vit dyrka tað ljósa hárið og tey bláu eyguni. Og hvat so? Kanst tú spyrja. Tað er væl loyvi at dáma ljóst hár... júsa.

Nú eru nógv fólk í Føroyum, sum ikki hava ljóst hár og blá eygu. Um tú guglar hárlit og slíkt, sært tú at bara 3-4% av heimsins fólkum hava ljóst hár og 75-85% hava myrkt hár. Eg las eina yvirskrift í einum íslendskum miðli her fyri: *Fyrsti brúni íslendingur, sum sýnir fram i listasavni Reykjavíkar.* Eg hugsaðu uuuhhh kann mann siga tað, kann mann kall fólk brún..fyrsti brúni íslendingur, hon eitur Dýrfinna Benita Basalan, mamma hennara er filipinsk, og tað var hon sjálv, sum kallaði seg brúnan íslending, men hví ikki? Hon hevði ivaleyst eina ætlan við at siga so, vildi gera tað natúrligt onkur er hvítur onkur er brúnur ella svartur, hvussu ber tað til, at tað skal vera bannað at siga húðarlit, vit kunna væl siga, at onkur er svarthærd ella ljóshærd?

“Tá stongd var ei bóndans stova” er úr øðrum sangi, snýr seg um gestablídni...”føroyingar eru so blíðir”...hoyrist ofta, og tað er ofta føroyingar sum siga so um føroyingar....er tað so satt...ella er tað  “konteynarar og eitt bussskýli, eitt teppi ger so væl” í sanginum Landaplágan hjá Herborg Torkilsdóttur, sum er sanna myndin.....ja, eisini tað svíður.

Og hvussu við móðurmálinum? tað finnast nógv ymisk móðurmál í Føroyum, tí fyri tað um tú flytur í eitt annað land, so hevur tú tín samleika við. Tað er upp til okkara at lofta hesum broytingum á skynsaman hátt. Lykilsorðini eru (sum vit vita) upplýsing, tolsemi og virðing.

.......

Frælsið eg fekk at velja evni er nú brúkt, illa ella væl. Veri so tað!

Men í dag er veitsludagur, vil ynskja øllum -- brúnum, hvítum, svørtum við purlum, skallutum, við sløttum hári ljósum ella myrkum góða framtíð í marglittum Føroyum. Gangi gøtan tær á møti !